# TILTØK

**Meinigheitin í Hoyvík**
*uppi á Brekku 3*
Leygardagin After Eight, høllin er opin frá kl. 13-15.
Sunnudagin kl. 11 Gudstænasta v/ Anniku við Skipá.
Sunnudagsskúlin byrjar aftur kl. 14.
Mánakvøldið kl. 20.30 Bønarmøti.

**Adventkirkjan**
Leygardagin kl. 10 Barnabíbliutími og bíbliugransking. Evni: Jesus og Halgidómurin. Kl. 11 Gudstænasta, Ingelis Jensen.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Leygardagin kl. 11 Útifundur við Handilskjarnan – um viðrar.
Sunnudagin kl. 11 Møti, sunnudagsskúlin byrjar kl. 14. Bøn kl. 17.30 og Møti kl. 18.
Skótarnir byrja mánadag, smáskótafundur kl. 17 og stórir skótar kl. 19.
Mikudag kl. 15 Bønarmøti.

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 er Morgunmøti, Sverri Steintún talar. Barnaansing er samstundis. Sunnudagsskúli er kl. 12.15. www.hebron.fo

**Aglow, Tórshavn**
Fundur verður í hølunum hjá Frelsunarherinum leygarkvøldið 23. august kl. 19.30, allar kvinnur eru vælkomnar.

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 Messa í Kerit.
Leygardag kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudagin kl. 11 Hámessa og barnadópur v/ Patrick Sheils í Mariukirkjuni. Aftaná verður kirkjukaffi.

**Vesturkirkjan – heystkonfirmatión**
Heystkonfirmantarnir verða bidnir um at møta í Vesturkirkjuni fríggjadag 22. august kl. 15.00. Markið millum vestara og eystara prestagjald er Tróndargøta, Dalavegur og Villingardalsvegur.

**Havnar kirkja – heystkonfirmatión**
Heystkonfirmantarnir verða bidnir um at møta í Havnar kirkju fríggjadagin 22. august kl. 15.00. Markið millum vestara og eystara prestagjald er Tróndargøta, Dalavegur og Villingardalsvegur.

**Samkoman Lívdin**
*í Hoyvíkar skúla*
Sunnumorgunin á familjumøtinum kl. 10.30 talar Jógvan Zachariasen um evnið: Hví kristindómurin? og á tilbiðjunarmøtinum kl. 12 talar Jákup Jacobsen um evnið: Tey fimm endamálini – tænastan. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldri á báðum møtunum. Sunnudagsskúlin er kl. 12. Drekkamunnur er millum bæði møtini.
**Úti á Fløtum**
Mánakvøldið kl. 20 byrjar Alfa-Beta skeið
og týskvøldið kl. 20 verður undirvíst um Opinberingina (fyrsti partur) bæði kvøldini við Jógvan Zachariasen.
heimasíðan: www.livdin.fo

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Sunnudagsskúlin byrjar aftur sunnudagin kl. 14.00.

**Samkoman Rhema**
*Staravegur 5*
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti og sunnudagsskúli. Øll eru vælkomin. www.rhema.fo

**Meinigheitshúsið**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/ Jan Johannesen, Fríðbjørg Jensen syngur.

**Filadelfia**
*Landavegur 22*
Í kvøld kl. 20 Ungdómsmøti.
Í morgin kl. 17 Landsbøn.
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Samuel Dunya, kl. 11.30 Barnagudstænastan byrjar aftur.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarskúlin.
www.filadelfia.fo

**Samkoman Immanuel**
Í kvøld kl. 20 Kongsins Herlið, 8 ár og eldri eru vælkomin.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti og kl. 18 Evangeliskt møti. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið, Vestmanna**
Sunnudagin kl. 19 Møti.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21 Opið hús.
Sunnudagin kl. 17 Møti við Ólavi Jaocbsen. Barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna.
www.keldan.fo

**Missiónshúsið í Rituvík**
Sunnukvøldið kl. 18 Møti v/ John S. Myllhamar trúboðara. Innsavnan.

**Bønhúsið Hellur**
Sunnudagin kl. 16 Møti v/ John S. Myllhamar, trúboðara, innsavnan.

**Missiónshúsið, Leirvík**
Í sambandi við at sunnudagsskúlin byrjar aftur, verður skipað fyri familjugudstænastu sunnudagin kl. 11. Øll eru vælkomin.

**KFUM & K í Norðoyggjum**
Hóskvøldið kl. 20 Bíbliutími við Jákup í Mýru.
Fríggjakvøldið kl. 22 Opið hús.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarmøti, kl. 18 Møti við Knút Larsen. Kl. 21 Ungdómsmøti. Øll hjartaliga vælkomin.
www.kuff.fo

**Soli Deo Gloria**
Sunnudagin kl. 18 Møti v/ Poul Thomsen.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.

**Getsemane, Klaksvík**
Mikukvøldið kl. 20 Bønarmøti.
Sunnudagin kl. 11 Møti (barnaansing er undir møtinum). Tú ert hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Skopun**
Vikuskiftismøtir byrja fríggjakvøldið kl. 20 við sang- og vitnimøti, Jónhilda og Guðlak luttaka.
Leygarkvøldið kl. 20 Møti við Hjalgrim Davidsen, Jónhilda og Guðlak syngja.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli kl. 18 Møti við Hjalgrim Davidsen, Jónhilda og Guðlak syngja. Innsavnan til húsið, bøn- og lovsangur er 1/2 tíma áðrenn møtini. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betania, Skopun**
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti. Verið hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Ungdómsmøti verður fríggjakvøldið kl. 21.30.
Sunnukvøldið kl. 18 Møti við Johan Thomasen. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Sion, Vágur**
Sunnudag kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Møti. Øll eru vælkomin.

Mánadag kl. 21 Bønarmøti.
Frá kl. 21-23 verður bønartænasta á tlf. 373777. Tú ert vælkomin at ringja um tær tørvar forbøn.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Mánadagin 18. august*
kl. 10 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10-18 Ítriv
kl. 14-18 Kortspæl, landastrok, bobbspæl, telving, dart og onnur spøl
*Týsdagin 19. august*
kl. 10-12 Vit baka
kl. 10-11.30 Vit syngja, Óli Vang. Øll eru hjartaliga vælkomin
kl. 15 Prát um tað sum verður í morgin frá 10-17
*Mikudagin 20. august*
kl. 10-17 Hvat skulu vit gera í vetur? Øll eru hjartaliga vælkomin at koma við hugskotum
*Hósdagin 21. august*
kl. 10-10.30 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Opið hús
*Fríggjadagin 22. august*
kl. 10-17 Hvat skulu vit gera í vetur? Øll eru hjartaliga vælkomin at koma við hugskotum.

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Felagið Tórshavn – gongutúrur**
Sunnudagin 24. august verður gongutúrur: Oyggjarvegur-Norðadal-Syrðadal. Farið verður av Kunningarstovuni kl. 14.00. Miðaltungur túrur. Havið heit og góð gonguklæðir og matpakka við. Tilmelding.

**Føroya Heimavirkisfelag**
Postadressa: J. Paturssonargøta 24, 100 Tórshavn.
Formaður: Óluva Vilhelmsen.
T-postur: fhf@craft.fo
Heimasíða: www.craft.fo
Tlf. 322686 / 319629

**Tilhaldið í Sandoynni**
Tilhaldið er opið mánadag og mikudag frá kl. 14–17.00. Drekkamuður er at fáa báðar dagarnar. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**NA (Anomymir narkomanar)**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundur er hvørt sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh. tlf. 319630/61 655400.

**ACA**
(Adult children anonymous). Fundur fyri tilkomin, ið eru uppvaksin í alkoholiskum ella dysfunktionellum familjum er hvørt leygarkvøld kl. 20.00-21.30 í Reinsaríinum, Tórsgøta 5, Tórshavn.
www.aca-danmark.dk.
E-mail:
acafaroeislands@hotmail.com

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Týsdag: kl. 20.00–21.15
Mikudag: Sporafundur kl. 20.00–21.00
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: kl. 17.00–18.00
Sunnudag: kl. 11.00–12.00
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 í Al-Anon, Tórsgøta 5 (inngongd vestanfyri). Telefontíð er fríggja-, leygar-, sunnu- og mánadag frá kl. 19-21 á tlf. 508030.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

**Blái Krossur – Glyvrar**
bjóðar til eftirviðgerðarfund hvørt mánakvøld kl. 19 í hølunum hjá Bláa Krossi á Glyvrum.

**Blái Krossur – Eiði**
bjóðar til eftirviðgerð í Losjuni á Eiði annaðhvørt týskvøld kl. 20. Meira fæst at vita á tlf. 315575.

**Javni**
Skrivstovan er *stongd vegna summarfrí.* Opið er aftur 11. august 2003.
Hevur tú atrokandi boð ella spurning, so ring til lim í starvsnevndini ella økisnevndini.
Heimasíðan: www. javni.fo

**Náttarravnarnir í Tórshavn**
Tín stuðul ger mun! Blív limur ella gang ein royndartúr. Ringið Carl 215570, Guðrið 220019, Hans Jákup 217818, Tone 261165, Ella 316261, Arni 222552

**Lymfødemfelagið**
Box 2113, FO 165 Argir
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð. Samband fæst við felagið á tlf. 448454, Fía í Túni, ella tlf. 313424, Arnhild Johannesen.

**Føroyskir fiskimenn uttanlands**
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiskimenn í Canada, Svøríki, Danmark, Íslandi og Noregi.
Limagjald 200 kr. um árið.
Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

**Heilafelagið, MBF-húsið**
Íslandsvegur 10C
tlf./fax 321520
Telefontíð hvønn týsdag kl. 18.00-20.00.

**Felagið fyri lesi- og skriviveik**
*Postadr.: MBF-Húsið*
*Íslandsvegur 10c*
Endamál felagsins er at hjálpa teimum ið hava lesi- og skrivitrupulleikar.
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð men samband fæst við felagið á tlf. 441541, Anne Karin Kjeld og 318867, Laila Egholm.

**Parkinsonfelagið**
*MBF-húsið, Íslandsvegur 10C*
Felagið hevur ikki fasta skrivstovutíð, men samband fæst við felagið hjá Kristinu, tlf. 317317,

**Giktafelag Føroya**
Íslandsvegur 10 C
FO-100 Tórshavn
T-post: gikt@gikt.fo
www.gikt.com
Skrivstovan: Tlf. 31 02 37
Opið: týs- og hósdag kl. 11.00-14.00.
**Fibromyalgibólkurin:** Opið mánadag kl. 11.00-13.00.
**Foreldraumboð:**
Nicolina Højgaard, heilsusystur tlf. 31 47 50
**Ungdómsumboð:** Sára Tummassardóttir tlf. 37 31 06.

**Deyvafelag Føroya**
*Íslandsvegur 10B*
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 10.00 til kl. 15.00. Tlf. 317597, fartlf. 222381, skrivitlf. 316929 fax 313609 og teldupostadr. deaf_fo@post.olivant.fo
heimasíðan: www.deaf.fo

**Ráðgeving um heilaskaðar**
Hevur tú fingið ein heilaskaða, ert avvarðandi ella arbeðir við fólki við heilaskaða og hevur tú okkurt at spyrja um hesum viðvíkjandi ella annað, so ert tú vælkomin at venda tær til okkara.
NeuroCom, 450 Oyrarbakki
Tlf. 422 763 ella Fartlf.: 225 263
Teldupostur: info@heilsu.info
www.heilsu.info
e-mail: fhkv@post.olivant.fo
Hildebjørg, tlf. 313897,
e-mail:
jwimport@post.olivant.fo
Nakað av bókum eru til láns hjá felagnum.

**MBF – Meginfelag teirra brekaðu**
*Íslandsvegur 10c*
*FO-100 Tórshavn*
Skrivstovan er opin allar gerandisdagar millum kl. 09.00 og 16.00.
Tlf. 317373, fartlf. 264839
faks. 310813
Teldupostur: mbf@mbf.fo
Heimasíðan: www.mbf.fo

## GULLBRÚDLEYP

Í dag, fríggjadagin 22. august hava hjúnini Any og Mervyn Dimon á Tvøroyri gullbrúdleyp. Øll, sum vilja heilsa uppá gullbrúdleypsparið, eru vælkomin í heimið hjá Jean, í dag millum kl. 13.00-16.00. Kvøldið verður hildið saman við børnum, ommu- og abbabørnum.

## 85 ÁR

Leygardagin 23. august fyllur Niclas Jespersen, Tórshavn, 85 ár. Tey, ið vilja heilsa uppá hann, eru vælkomn í heiminum millum kl. 10.00-13.00.

Mánadagin 25. august verður Annebeth Johansen á Strondum, 85 ár. Føðingardagurin verður hildin í Pensionistahúsinum á Strondum leygardagin 23. august frá kl. 19.00.

## PRÓGV

17. juni tóku Brynhild Høyer f. Olsen og maður hennara Rasmus Høyer prógv sum Cand.Merc. á Handilsháskúlanum í Århus.



# FILMSTEIGURIN

# Lara Croft Tomb Raider: The Cradle of Life



Djúpt undir vatnskorpuni í legendarisku oynni, Santorini, kavar fornfrøðingurin og ævintýrarin, Lara Croft, inn í druknaða Luna Templið. her finnir hon dýrabærastu skattirnar hjá Alexandur Mikla, stolnir og rændir frá øllum tí heimi, hann legði undir seg… Men eisini loysnina upp á eitt av forntíðarinnar størstu loyndarmálum: Sannleikan handan legenduna um eskuna hjá Pandora!



Tíverri koma kinverkir gravránsmenn henni í forkeypið. Teir eru fúsir at selja loyndarmálið til tann fyrilitarleysa Dr. Reiss, sum ger alt fyri at fáa fatur í tí sum veruliga er heimsins vandamiklasta lívfrøðiligu vápn. Lara Croft má sameina seg við tann órokniliga leigusoldatin, Terry Sheridan, fyri at verða fyrst á hesum søguliga loyndarstað – í skarpari kapping við leigusoldatarnar hjá Ross í eini jagstran, sum førir hana frá kuldanum í Sibiria yvir Shanghai og Hongkong til Afrika, har endaliga uppgerðin bíðar í »Lívsins Vøggu«.

Angelina Jolie er enn einaferð farin í trekking stúvlarnar og kropstøttu klæðini, hevur spent pistólina um lendarnar og farin í venjing fyri at gera livandi ókrúndu teldudrotningina, Lara Croft frá Tomb Raider. Í »Lara Croft Tomb Raider: The Cradle of Life« eru saman við henni Gerard Butler sum Terry Sheridan og Ciarán Hinds sum Jonathan Reiss.




**Frumsýning**
Fríggjadagin 22.08. kl. $20^{30}$ Fríggjadagin 22.08. kl. $23^{00}$
Leygardagin 23.08. kl. $20^{30}$ Leygardagin 23.08. kl. $23^{00}$
Sunnudagin 24.08. kl. $19^{30}$ Sunnudagin 24.08. kl. $22^{00}$

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**

**HAVNAR BIO**
P Tlf. 311956 P
www.bio.fo




Fríggjadagin 22.08. kl. $22^{30}$ Leygardagin 23.08. kl. $22^{30}$
Sunnudagin 24.08. kl. $22^{30}$




Fríggjadagin 22.08. kl. $20^{00}$ Leygardagin 23.08. kl. $20^{00}$
Sunnudagin 24.08. kl. $20^{00}$

**KOMANDI FILMUR**




Frumsýning Fríggjadagin 29.08.

P BIO KIOSKIN P
Heitt Pop-Corn - Coca Cola - Góðgæti - Fóm ís - o.m.a.